# Hvessingur skutlaði Sølmund



Mynd: Jens Kristian Vang

**6-MANNAFØR KVINNUR Hesa ferð eydnaðist tað endiliga teimum í Sundalagnum so rudduliga at seta tær á Skálafjørðinum upp á pláss**

Tróndur Arge

Trý sekund, fimm sekund og trý sekund. Tað var tíðarmarginalurin frá Sølmundi og aftur til Hvessing í trimum teimum fyrstu róðrunum í ár. Tí var tað lítið og einki, sum bendi á, at tað skuldi fara at eydnast hjá teimum í Sundalagnum at fáa bilbukt við tær á Skálafjørðinum.

Á Jóansøku vann Sølmundur fyri fjórðu ferð, men tá fóru guli og grøni báturin um málið mest sum stavn um stavn. Tað kundi boða frá tættari kapping í Vestmanna, men tann kappingin var av ongum: Stutt sagt tí Hvessingur hesa ferð smurdi Sølmund av!

Hvessingur legði bragdliga fyri, og Hvessingur var fremstur allan teinin. Tá ið bátarnir fóru um málið, var munurin nærri tveimum enn einari bátslongd. Sigurin hjá Hvessingi var tann mest sannførandi av øllum í kappingunum á Fjarðastevnu leygardagin, og sigurin var so mikið sannførandi, at tað í undanfarnu kappingunum bara eina ferð hevur eydnast Sølmundi at vunnið so sannførandi. Tað var, tá ið tær kappaðust á Sundalagsstevnu í heimasjógvi hjá Hvessingi.

Sølmundur, sum hevði vunnið allar fýra undanfarnu ferðirnar, noyddist hesa ferð rættuliga at stríðast fyri at varðveita næstfremsta plássið, og tað eydnaðist. Men kappingin frá Riddaranum var ógvuliga stór. Sølmundur er framvegis FM favorittur – trý stig frammanfyri Hvessing – men gongdin hesa ferð letur upp fyri, at talan kann gerast um spennandi FM finalu á Ólavøku.

trondur@sosialurin.fo

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Hvessingur | 04:48.23 |
| 2 | Sølmundur | 04:53.00 |
| 3 | Riddarin | 04:54.01 |
| 4 | Gongurólvur | 05:01.14 |
| 5 | Jarnbardur | 05:19.13 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sølmundur | 34 |
| 2 | Hvessingur | 31 |
| 3 | Riddarin | 23 |
| 4 | Gongurólvur | 22 |
| 5 | Jarnbardur | 12 |
| 6 | Lómur | 9 |
| 7 | Kollfirðingur | 2 |



Mynd: Jens Kristian Vang

# Beinta var øgilig á síðstu metrunum

**5-MANNAFØR GENTUR Eftir at Falkurin hevði verið næstan tríggjar bátslongdir á odda, eydnaðist tað á sjálvari mállinjuni Beintu at rógva seg til sigurin**

Tróndur Arge

Ikki serliga góðu líkindini í Vestmanna leygardagin vóru ivaleyst høvuðsorsøkin til, at støðurnar í róðrunum ofta vóru so skiftandi, sum tær nú eina ferð vóru tað.

Eitt dømi um hetta var kappingin millum 5-mannaførini við gentum. Falkurin úr Hósvík og Beinta úr Miðvági hava verið stinnastar tær seinastu ferðirnar, og tí vóru hesir báðir bátarnir favorittar.

Falkurin legði seg á odda, og flogið var høgt hjá gentunum úr Sundalagnum, sum hesar seinastu vikurnar hava verið at síggja longu klokkan sjey á morgni.

Eina løtu var Falkurin meiri enn tvær bátslongdir frammanfyri næsta kappingarneytan.

Men so spentu tær á Beintu á. Tað tóktist sum um, at tær á seinasta teininum dugdu væl at ríða á aldukambinum, og á sjálvari mállinjuni eydnaðist tað Beintu at vinna seg framum Falkin.

Eitt framúr avrik av teimum í Miðvági, sum ber við sær, at Beinta nú er fremst í FM kappingini. Sílið var klárt nummar trý, og Sílið er trý stig aftanfyri Beintu. Ørnin hevur havt støðuga framgongd, og hesa ferð lá væl fyri hjá Ørnini í startspurtinum. Men so gekk ikki so væl, og Ørnin endaði á fjórða plássi, ikki færri enn níggju sekund aftanfyri Beintu.

Falkurin er framvegis størsta hóttanin hjá miðvágsgentum. Munurin teirra millum er eitt stig, og tí er alt opið undan Vestanstevnuni, sum verður í Sørvági nú leygardagin.

trondur@sosialurin.fo

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Beinta | 05:13.09 |
| 2 | Falkur | 05:13.14 |
| 3 | Sílið | 05:17.20 |
| 4 | Ørnin | 05:22.04 |
| 5 | Tjaldrið | 05:23.19 |
| 6 | Silja | 05:31.07 |
| 7 | Tambar | 05:38.19 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Beinta | 31 |
| 2 | Falkur | 30 |
| 3 | Sílið | 28 |
| 4 | Tjaldrið | 17 |
| 5 | Ørnin | 17 |
| 6 | Silja | 9 |
| 7 | Tambar | 6 |
| 8 | Fípan Fagra | 2 |